Setursskúli til Mikladals

So er tíðin komin, at vit fara á Setursskúla. Í ár gongur leiðin til Mikladals.

Vit møta á Farstøðini týsdagin 13. juni klokkan 11.50. Bussurin koyrir klokkan 12.10.

Vit koma aftur til Havnar við bussi hósdagin 15. juni 17.50.

Skúlin letur 100 krónir fyri hvønn næming, og vit hugsaðu, at vit taka restina av tí tað kostar, av pengunum, ið vit fingu fyri Biophilia.

Í Mikladali er eingin handil, men ein kiosk er á Trøllanesi, so vit fara kanska at ganga gjøgnum tunnilin norður á Nes. Um tit ætla at keypa har, mugu tit hava pengar við.

Roynið at pakka so skilaliga sum tað ber til, tí at tað er sera lítið pláss í bussinum í Kalsoynni.

At hava við:

- Soviposa, lak/lakposa og kodda(madrassur eru í húsinum)
- skiftiklæði
- regnklæði/gummistylvar/góðar gonguskógvar og lummalykt(sum riggar)
- handklæði og annað til persónliga røkt
- tit kunnu hava góðgæti við
- annað

Annað at hava við, kort og borðspøl, bólt, hoppiband, elastikk, (tráður og bjarginarvest)

Tað hevði verið ordiliga deiligt, um vit fingu onkran at baka okkum okkurt lekkurt:

- skuffikaku/muffins/vaflur/smákøkur/bollar ella líknandi

Sjálvandi eru tað bara lærarnir, ið hava fartelefon við. Um tað er neyðugt at koma í samband við næmingarnar, hava vit telefon við: Sóleyð tlf. 21 18 52, Niklas tlf. 253982, Palli tlf. 769263

Við setursskúlakvøðu

Palli, Niklas og Sóleyð